## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri, seinnapartin minni vindur av útsynningi. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Mánakvøldið fránskar hann vindin av landsynningi, men væntandi turt. Hitin millum 9 og 13 stig.

# Alex staðfesti sína tign

**Country- og gospelkonsertin í Trongisvági leygarkvøldið eydnaðist væl og fólk fegnaðust um at hoyra Alex Bærendsen aftur, men eisini Kristina og Hallur hugtóku**



*Sera væl eydnað konsert, har eini 400 fólk vóru samankomin í høllini í Trongisvági.*
*Mynd: Finn Johannessen*

KONSERT
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Talan var um eina fjølbroytta konsert í høllini í Trongisvági leygarkvøldið. Mong gleddu seg óivað um at hoyra Alex Bærendsen aftur á føroyskum palli. Og hann gjørdi come-back og staðfesti sína støðu og tign.

Alex prógvaði, at hann enn er væl dámdur og hann fekk fólkini við, tá hann sang sínar kendu sangir, men eisini tilfar hjá t.d. Elvis var á skránni.

Dóttir hansara, Kristina Bærendsen, er eisini ófør sangarinna, og hon hevði eina sangskrá, ið bar brá av bluegrass tónleiki, og hesum tóku lurtararnir væl ímóti.

Tá Hallur Joensen kom á pallin var hæddarpunktið nátt, ongin ivi um tað, og til stillu løgini komu eldførini fram.

Dugnaligu tónleikararnir gjørdu sítt til at seta ptikkin yvir i'ið.

Sera væl eydnað konsert, har eini 400 fólk vóru samankomin í høllini í Trongisvági.

Beint eftir kl. 21.00 bjóðaði Finn Johannessen, vælkomin. Síðani kom Elis Poulsen á pallin og presenteraði hann tónleikarar og sangarar.

Konsertin vardi í góðar tveir tímar, og var tað í heilum at áhoyrarnir reistust, sungu við og at lógvabrestirnir rungaðu.

Sama tiltak var roynt í Klaksvík millum jóla og nýggjár, og hóast har vóru fleiri fólk, enn í Trongisvági, so var einki at taka seg aftur í, at stemningurin her var framúr góður, kanska fleiri ferðir betur, enn við fyrru konsertina í Klaksvík.

Fólkini aftanfyri VILT skipaði fyri konsertini.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -4 |
| Nuuk | -3 |
| Qaqortoq | -- |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 18 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 9 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 6 |
| Keypmannah. | 10 |
| Helsinki | 5 |
| Moskva | 2 |
| Berlin | 16 |
| Warzawa | 13 |
| Kiev | 7 |
| Bukarest | 12 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 19 |
| Róm | 20 |
| Malorca | 19 |
| Athen | 15 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 21 |
| New York | 10 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 24 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 20 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt djúpt lágtrýst, 975 hPa. í útsynning úr Íslandi fer spakuliga í landsynning og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum í kvøld.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga í landnyrðing. Lágtrýstið yvir Íslandi fer eisini spakuliga í landnyrðing og kuldabrúgvin við Føroyar fer eystureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 21/04 kl. 06[00] – 22/04 06[00]. Hitin í gjár: 7,9°
Minsti hiti máldur í apríl: -8,7° - Mesti hiti máldur í apríl: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 21/04 kl. 06[00] – 22/04 06[00].
Avfallið higartil í apríl: 91 mm




Javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 16. apríl | Mánin longst frá jørðini |
| 17. apríl | Seinna kvarter |
| 25. apríl | Tendring |
| 28. apríl | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. apríl | 05:14 | 17:34 | 04:14 | 16:34 | 04:29 | 16:49 | 07:14 | 19:34 | 08:14 | 20:34 | 03:29 | 15:49 | 02:29 | 14:49 | 05:29 | 17:49 | 06:29 | 18:49 | 04:59 | 17:19 | 06:14 | 18:34 |
| 23. apríl | 05:53 | 18:14 | 04:53 | 17:14 | 05:08 | 17:29 | 07:53 | 20:14 | 08:53 | 21:14 | 04:08 | 16:29 | 03:08 | 15:29 | 06:08 | 18:29 | 07:08 | 19:29 | 05:38 | 17:59 | 06:53 | 19:14 |
| 24. apríl | 06:34 | 18:57 | 05:34 | 17:57 | 05:49 | 18:12 | 08:34 | 20:57 | 09:34 | 21:57 | 04:49 | 17:12 | 03:49 | 16:12 | 06:49 | 19:12 | 07:49 | 20:12 | 06:19 | 18:42 | 07:34 | 19:57 |
| 25. apríl | 07:18 | 19:44 | 06:18 | 18:44 | 06:33 | 18:59 | 09:18 | 21:44 | 10:18 | 22:44 | 05:33 | 17:59 | 04:33 | 16:59 | 07:33 | 19:59 | 08:33 | 20:59 | 07:03 | 19:29 | 08:18 | 20:44 |
| 26. apríl | 08:07 | 20:35 | 07:07 | 19:35 | 07:22 | 19:50 | 10:07 | 22:35 | 11:07 | 23:35 | 06:22 | 18:50 | 05:22 | 17:50 | 08:22 | 20:50 | 09:22 | 21:50 | 07:52 | 20:20 | 09:07 | 21:35 |